SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Sjúkrahúsverkið

# Leiðslumenning

Útboð – mai 2023

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo

ls.fo

# Innihald

Innleiðing ........................................................ 2
Um Sjúkrahúsverkið ........................................................ 2
Bygnaður ........................................................ 2
Leiðslumenningin ........................................................ 3
Sáttmáli og karmar ........................................................ 4
Krøv til tilboðið ........................................................ 5
Meta um tilboðini ........................................................ 5
Tilgongdin frameftir ........................................................ 6
Fyrivarni og alment innlit ........................................................ 7



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Innleiðing

Sjúkrahúsverkið bjóðar út samstarv um leiðslumenning. Útboðið verður gjørt sambært ”Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum”.

Útboðstilfarið inniheldur, umframt hetta skjalið, eisini eitt organisatiónsdiagram.

## Um Sjúkrahúsverkið

Leiðararnir í Sjúkrahúsverkinum skulu ígjøgnum eina leiðslumenningartilgongd fyri at førleikamenna seg. Í 2018 varð ein ovasta leiðsla fyri Sjúkrahúsverkið skipað og tilgongdin um at sameina Sjúkrahúsverkið byrjaði. Endamálið var at fáa sjúkrahúsini at virka sum eina sterka eind. Í hesum sambandi hevur Sjúkrahúsverkið fingið eitt felags virðisgrundarlag, og felags strategisk mál. Eitt av hesum málum er *Leiðsla og leiðslumenning*. Týdningarmikið er, at leiðslan í øllum løgum í Sjúkrahúsverkinum gongur somu leið – fram móti visjóni. Fyri at tryggja, at leiðslan gongur á odda, bæði hvat viðvíkir mentan og í atburði, er neyðugt at skipa fyri grundleggjandi leiðslumenning fyri leiðarar í Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahúsverkið fevnir um Klaksvíkar Sjúkrahús, Suðuroyar Sjúkrahús, Landssjúkrahúsið og Sjúklingahotellið Tórshavn.

Aðalmálið hjá Sjúkrahúsverkinum er, at veita borgaranum eina dygdargóða heilsutænastu alt lívið. Sjúkrahúsverkið veitir heilsutænastur, ið fevna frá gitnaði til seinastu fráferð, og er málið at veita dygdargóðar heilsutænastur, bornar av vitan og tænastusinni. Vitan fevnir um fakliga vitan, førleikar og menning, tøkni í breiðastu merking og mentan, sum er opin og fevnandi. Tænastusinni er ein uppliving av at vera í miðdeplinum, uppliving av góðari tænastu og uppliving av nærlagni.



Eitt av endamálunum fyri leiðslumenningini í Sjúkrahúsverkinum er, at vit hava eitt felags leiðslukodeks. Eitt leiðslukodeks, ið staðfestir ynskta atferð hjá leiðarunum í Sjúkrahúsverkinum.

## Bygnaður

Leiðslan í Sjúkarhúsverkinum er skipað við einum forstjóra, tveimum stjórum og fýra varastjórum.

Tilsamans hevur Sjúkrahúsverkið á leið 107 leiðarar á ymiskum leiðsluløgum.

- Ovasta leiðslan er skipað við sjey leiðarum.
- Depilsleiðslan er skipað í sjey ymiskar deplar á Landssjúkrahúsinum við tilsamans níggju depilsleiðarum.
- Tilsamans deilt yvir sjey deplar og trý sjúkrahús, eru tað á leið 90 deildar- og varaleiðarar í Sjúkrahúsverkinum.

Sjúkrahúsverkið er eitt fjølbroytt arbeiðspláss, har virðini stev, áræði og flog, eru okkara kumpass, sum vit brúka í okkara yrki í gerandisdegnum.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

Í stuttum kann sigast um Sjúkrahúsverkið:

- Sjúkrahúsverkið er eitt politiskt stýrt verk og harvið bundið til givnar fíggjarligar karmar.
- Her starvast út við 1.200 starvsfólk innan 30 ymiskar fakbólkar.
- Sjúkrahúsverkið veitir eina breiða viftu av viðgerðum, sjúkugreinanum og tænastum.

## Leiðslumenningin

Í sambandi við leiðslumenningina ynskir Sjúkrahúsverkið at gera avtalu um samstarv við uttanhýsis útbjóðara, sum kann veita, samskipa og leiða eina menningartilgongd í 2023-2025.

Sjúkrahúsverkið vil í hesi leiðslumenningartilgongdini, at atlit verður tikið til fylgjandi:

- At hvørt leiðsluskeið heldur á í 6 mánaðir og at 1 ella 2 hold koyra samstundis, men møguliga forskotið. Í alt er ætlanin at 5 hold á uml. 20 fólk skulu ígjøgnum leiðsluskeiðið samstundis. Leiðslumenningartilgongdin skal byrja í heyst 2023 og er í útgangsstøði mett at taka 2 ár. Tað væntast at leiðslumenningartilgongdin fer at taka á leið 600 tímar deilt yvir 2 ár.
- Tilgongdin skal tryggja eina sterka og skipanarliga samanhangsmegi.
- Tilgongdin skal stuðla undir virðini og misjónina hjá Sjúkrahúsverkinum.
- Tilgongin skal vera við til at menna evnini hjá leiðarunum og evnini at traðka fram.
- Leiðslumenningin skal umfata øll leiðsluløg í Sjúkrahúsverkinum.
- Leiðslumenningin skal hava útgangsstøði í tí veruleika, sum leiðararnir eru partur av í gerandisdegnum.
- Leiðslumenningartilgongdin skal fevna um tað bygnaðarliga margfeldið, sum eyðkennir Sjúkrahúsverkið.
- Skipast skal fyri leiðslufakligari menning, bæði í felag og eisini hvør sær. Tað merkir, at ætlanir fyri hvørt leiðslustig eiga at verða gjørdar
- Tilgongdin verður skipað í sjálvstøðugum modulum, sí *Bygnaður og innihald*.
- Innanhýsis arbeiðsorka í Sjúkrahúsverkinum, í mest møguligan mun, skal brúkast og mennast í tilgongdini.

Neyðugt verður at brúka uttan- og innanhýsis undirvísarar á summum modulum og hetta skal leggjast til rættis saman við starvsfólkaleiðaranum á Landssjúkrahúsinum. Harafturat skal leiðsluskeiðið skipast bæði sum heilir arbeiðsdagar og sum internat.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

*Bygnaður og innihald*

Leiðarar í Sjúkrahúsverkinum skulu ígjøgnum niðanfyristandandi evni. Ástøði, sum skal brúkast er *Ledelse i praksis, 5. udgave*, skrivað av Erik Staunstrup, Andreas Kærgaard og Niels Vestergaard Olsen.

Sjúkrahúsverkið hevur sett saman eitt design til hvussu leiðslumenningin skal fara fram.

Modul í leiðslumenningini:

- Persónlig leiðsla
- Leiðsla og relatiónir
- Leiðsla og samskifti
- Løgfrøði
- Konfliktleiðsla
- Virðir og betranararbeiði
- Organisatións sálarfrøði
- Skipanir
- Tú og tín leiðsla framyvir

Ynskir tú at fáa nágreiniligt tilfar, vinarliga set teg í samband við hr@ls.fo



## Sáttmáli og karmar

Sáttmáli verður gjørdur við eitt felag ella samtak, sum skal bjóða navngivin starvsfólk.

Veitarin verður tímaløntur fyri sítt arbeiði sambært tímaprísinum, ið veitarin bjóðar í sínum tilboði.

Tey starvsfólk, sum felagið ella samtakið, ið vinnur útboðið, setir til uppgávuna, skulu sum útgangsstøði ikki skiftast út. Vísir tað seg, at samstarvið við veitaran ella við ávís starvsfólk hjá veitaranum ikki er nøktandi, tilskilar Sjúkrahúsverkið sær rætt til at hava møguleika at skifta ráðgevararnar út.

Sáttmálatíðarskeiðið er 2 ár við møguleika fyri at leingja upp til 3 ár, um báðir partar vilja tað.

Veitarin ger uppskot til ein sáttmála. Sáttmálin skal samsvara við krøvini, ið eru ásett í hesum útboðstilfari.

## Krøv til tilboðið

Tilboðið frá veitara skal upplýsa:

- Lívsrensl hjá starvsfólkum, sum verða knýtt til uppgávuna við kunning um førleikar, útbúgving og royndir seinastu 5 árini. Eisini skulu líknandi avrik/tilvísingar við góðum úrslitum síggjast í lívsrenslinum.
- Tímaprísur/samsýning – fyri veitingar fevndar av hesum tilboði, skal vera ein fastur, miðal tímatakstur.
- Minstu krøv: starvsfólk skulu í minsta lagi hava skjalprógvaðar royndir frá líknandi uppgávu.

## Meta um tilboðini

Tað er umráðandi at tryggja góðskuna, tá ið mett verður um innkomnu tilboðini. Vektingin av innkomnu tilboðunum verður gjørd soleiðis:

50% kostnaður
50% góðska

Útrokningin fer fram á hendan hátt:

<u>Góðska:</u> Førleikar, útbúgving og royndir hjá starvsfólkum. Út frá eini samlaðari meting – út frá førleikum, útbúgving og royndum – verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal. Vit gera vart við, at heta er okkara kvalitativa meting av góðsku.

<u>Tímaprísur:</u> Tilboðið við lægsta samlaða tímaprísi fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:

Tilboð við lægsta tímaprísi/tímaprísur í tilboði, ið skal metast x 50

Lægsti tímaprísurin í frymlinum kann aldrin verða lægri enn 400 kr., t. e. at bjóðar ein veitari ein tímaprís lægri enn 400 kr., verður tímaprísurin ásettur til 400 kr. í metingini.

Tað tilboðið, ið fær hægst stigatal vinnur útboðið og rættin um samstarv viðvíkjandi leiðslumenning í Sjúkrahúsverkinum.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

*Dømi um útrokning*

Góðska

- Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí starvsfólk hava fáar og ikki so viðkomandi royndir og førleikar, hava ikki viðkomandi útbúgving og veitarin hevur eina veika skipan. Hesin fær 12,5 stig.
- Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir, førleikar og útbúgving er á einum miðalgóðum støði. Hesin fær 25 stig.
- Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí starvsfólk hava tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnir og útbúgvingina. Hesin fær 50 stig.

Prísur

- Tilboð 1: Tilboðið við lægsta tímaprísinum hjá veitaranum er 500 kr. Hetta gevur 50 stig.
- Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 650 kr. Hetta gevur 500/650 x 50 = 38,5 stig.
- Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 800 kr. Hetta gevur 500/800 x 50 = 31,5 stig.

Samlað meting

- Tilboð 1: Góðska 12,5 stig + tímaprís á 50 stig = samlað meting á 62,5 stig.
- Tilboð 2: Góðska 25 stig + tímaprís á 38,5 stig = samlað meting á 63,5 stig.
- Tilboð 3: Góðska 50 stig + tímaprís á 31,5 stig = samlað meting á 81,5 stig.



*Tilboð 3 vildi í hesum førum verið vinnari av útboðnum.*

## Tilgongdin frameftir

Sjúkrahúsverkið bjóðar við hesum uppgávuna *Leiðslumenning* út við freist, sí niðanfyri. Tá ein veitari er funnin verður leiðslumenningin endaliga ment í samstarvi millum Sjúkrahúsverkið og veitaran.

Tíðarætlan:

- Vika 21: útboðið tøkt á útboðspallinum – 26. mai 2023.
- Vika 22 og 23: veitarar spyrja um ivamál. Freist at spyrja er 7. juni 2023 kl. 12:00 og skulu sendast til hr@ls.fo. Spurningar verða leypandi svaraðir skrivliga og Sjúkrahúsverkið kunnar hinar veitararnar um spurningarnar og svar.
- Vika 24: tann 14. juni 2023 kl. 12:00 er freist at lata tilboð inn.
- Vika 25 og 26: viðgerð av tilboðunum.
- Vika 26: Sjúkrahúsverkið tekur avgerð og fráboðan verður send veitarunum tann 28. juni 2023.

Úrslitið verður kunngjørt á Keypsportalinum og sent øllum tilboðsgevarunum umvegis teldupost. Tilboðið er ikki endaligt fyrr enn báðir partar hava skrivað undir sáttmálan.

## Fyrivarni og alment innlit

Tann, ið letur inn tilboð, eigur at hugsa um fyrivarni í mun til útboðstilfarið. Eitthvørt fyrivarni viðførir at Sjúkrahúsverkið kann vísa burtur innlatið tilboð.

Sjúkrahúsverkið tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum. Eisini tilskilar Sjúkrahúsverkið sær rætt til at havna einum tilboði, um vøran, ið verður bjóðað framm, er uttan fyri rímiligt mark, tá talan er um góðsku.

Fæst ikki ein sáttmáli við ein veitara, tilskilar Sjúkrahúsverkið sær rættin til at býta vørubólkarnar upp í fleiri partar, og samráðast víðari við einstakar tilboðsgevarar við støði í innkomnu tilboðunum.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo